SOSIALURIN

Føroyar — EEC — fiskimarkið

Leygardagin 17. februar hevur SOSIALURIN ein leiðara nevndur »Fiskasølustjórin og bíðitíðin«, sum er eitt aftursvar til eina grein, eg skrivaði í Dagblaðnum mikudagin 7. februar. Tað var ikki ætlan mín at leggja meg út í nakað blaðkjak um hetta, men áðurnevnda oddagrein í SOSIALINUM sigur mær, at tað er neyðugt við upplýsningum um EEC-málið. Eg skal tí í stuttum her royna at viðgera nakað av tí, sum fram er farið í hesum máli fyri at lesarin betur skal kunna skapa sær eina mynd av tí fyri okkum positiva útviklingi, sum EEC-málinum hevur verið fyri.

Sendiharravitjan

Í august 1970 høvdu vit vitjan av eini 15 donskum sendiharrum við uttanríkisráð Jens Christensen á odda. Eitt av endamálunum við hesi vitjan var at presentera EEC fyri okkum. Tað er einki yvir at dylja, at teir vinnulívsmenn, sum luttóku í hesum samráðingum, høvdu nógvar atfinningar, serstakliga til fiskimarkspolitikkin, sum var viðtikin av EEC-ráðnum á fundi í Luxemburg 30. juni 1970, og vil eg her í danskari týðing endurgeva part av eini statusrapport pr. 1.8.70, sum viðgerð fiskimarksmálið og sum bleiv framlagd á áðurnevnda sendiharrafundi:

»I henhold til det almindelige ikke-diskriminationsprincip i Fællesskabet foreskriver forordningen som hovedregel lige adgang for medlemslandenes fiskere til udøvelse af fiskeri på samtlige de under CE- landenes overhøjhed territorier. Ethvert medlemsland skal således inden for sit fiskeriterritorium yde fiskefartøjer, der fører et andet medlemslands flag og er indregistreret inden for Fællesskabet, samme vilkår med hensyn til adgang til og udnyttelse af disse fangstpladser som det pågældende medlemslands egne fiskefartøjer. Dette indebærer, at det fremdeles er det enkelte medlemsland, der fastsætter de konkrete bestemmelser for fiskeri (såsom fangsttider, -redskaber etc.) på dets eget territorium, blot må der ikke gælde andre regler for dets egne fiskere end for andre medlemslandes fiskere.

Undtagelse fra denne bestemmelser er dog mulig for så vidt angår sådanne fiskepladser, som er af betydning for opretholdelse af et for den lokale befolkning nødvendigt kystfiskeri. Denne undtagelsesbestemmelse har nu ifølge rådsresolutonen fået følgende formulering.

i. Fra betemmelsen i artikel 2 (i. e. om lige adgang til fangst pladserne) kan der gøres undtagelser, idet adgangen til visse fiskerizoner beliggende inden for en tre-sømilegrænse regnet fra medlemslandenes basislinier kan for en periode af højst 5 år regnet fra nærværende reglements ikrafttræden begrænses til kun at gælde den stedlige befolkning, såfremt denne i væsentlig grad er afhængig af kystfiskeri.

ii. De i stk. i forudsete fiskerizoner fastlægges af rådet efter nidstilling af kommissionen ved den i traktatens art 43, par. 2, forudseta afstemningsprocedure (i.e. kvalificeret flertal).«

Formuleringen indeholder intet udtrykkeligt om, hvorledes der skal forholdes efter udløbet af 5-års perioden, men i hvert fald kommissionens indstilling synes at være, at de særlige lokale hensyn i de nuværende CE-lande, der har begrundet undtagelsesbestemmelsen, er sådanne, at en længere tilpasningsperiode til hovedreglen ikke skulle være nødvendig, idet ingen af de pågældende kystbefolkninger vil kunne hævdes at være uden alternative beskæftigelsesmuligheder efter en sådan tilpasningsperiode. Formodningen er derfor, at — efter denne periode — vil forordningens almindelige regler om bl. a. støtte til afhjælpning af sociale misforhold og fremme af levevilkårene inden for fiskerisektoren finde anvendelse. ...

Forslaget artikel 5, hvorefter, såfremt intensivt fiskeri på et medlemslands fiskeriterritorium — uagtet de særlige af medlemslandets myndigheder fastsatte regler for fiskeri på dets territorium — medfører fare for fiskebestanden. Rådet kan fastsætte begrænsninger med hensyn til fiskeri af bestemte arter, fiskeriområder, fisketider, samt fiskemetoder resp. — redskaber, er endelig godkent af ministerrådet. Denne bestemmelse skal selvsagt anvendes ikke-diskriminatorisk over for andre CE-landes fiskere.«

Aftaná at fundurin hevði verið, bleiv niðursett ein embætismannanevnd til at meta um vansar og fyrimunir við limaskapi. Henda nevnd gav út rapport í December 1970. Tað kom einki nýtt fram í hesi rapport, og heldur ikki var nøkur broyting hend í fiskimarkspolitikkinum hjá EEC.

tjak um EF

Mikudagin 20. januar 1971 var ein útvarpssending, har luttóku Esmar Fuglø fyri sildaídnaðin, Ólavur Gregersen fyri fdnaðarfelagið, Óli Jacobsen fyri Fiskimannafelagið, Svend Thulesen fyri Reiðarafelagið og undirritaði fyri Føroya Fiskasølu. Niðurstøðan í hesi útvarpssending var, at hóast tilboð frá EEC um stórar markn aðarfyrimunir, so vóru vit betur farnir utanfyri um so var, at limalond um 5 ár skuldu hava sama rætt sum vit sjálvir á okk ara landleið og firðum (sí sitat frammanfyri). Var støðan hen da, so átti tað at liggja fremst hjá okkum at meta um, hvussuleiðis vit skuldu klára okkum marknaðarliga uttan fyri EEC.

Niðurstøða

Í ársfrágreiðingini hjá Føroya Fiskasølu, sum kom út í september 1971, er grein, sum við ger EEC-málið og metir um vansar og fyrimunir við limaskapi. Eg loyvi mær at endurgeva niðurstøðuna í hesi grein:

»Niðurstøðan er nú tann, at tað sum fyrst og fremst talar ímóti luttøku í EEC er fiskimarksspurningurin. Hevur marknaðarskipanin sum endamál at stabilisera prísin á rávøruni uttan tiltøk fyri at stabilisera prís in á teimum lidnu vørunum, so eru fyrimunirnir ivasamir. Hevur harafturímóti skipanin sum mál at stabilisera marknaðarprísirnar, soleiðis at ein stabilisering av rávøruprísunum kann verða *úrslitið*, so er skipanin bert av tí góða.

Ein viðkan av marknaðinum, tá tollgarðar detta burtur, er ein avgjørdur fyrimunur bæði hvat viðvikir møguleikunum at selja meiri og at fáa betri prísir. Spurningurin um hvørjar marknaðarfyrimunir vit kunnu fáa við at vera uttan fyri EEC, annaðhvørt beinleiðis við EEC ella ígjøgnum Danmark, eigur at verða kannaður gjølla. Vist verður í hesum sambandi á, at EEC hevur gjørt fyribils uppskot um at EFTA-lond, sum ikki søkja limaskap, møguglia kunnu fáa sáttmála um frían handil við tað økta EEC fyri vørur, sum í dag hava tollfrælsi innan EFTA (ídnaðarvørur).

Eisini eigur at verða gjølla kannað, hvørjar útflutningsvansar Føroyar vilja møta, um so er at vit verða uttan fyri EEC og ongar tollfyrimunir fáa innan marknaðarøkið.

Okkara rættindi í Grønlandi mugu vit eisini vurdera í samband við Danmarks luttøku í EEC við ella uttan Grønland.

Alt í alt tykist tað at vera nógvir spurningar, sum enn ikki eru greiddir til fulnar. Vinnulívið og avvarðandi mynd ugleikar hava óivað ov mikið at gera við at greiða hetta málið, áðrenn endalig støða kann takast.«

Íggjøgnum summarið og heystið 1971 verða fyrireikingar gjørdar til samráðingar við EEC. Samráðingarnar við EEC fara fram í november, desember 1971 og samráðingarprotokolatið dagfest 22. januar 1972 viðger støðuna viðvíkjandi Føroyum, og er úrslitið hetta:

»1. Danmark er sinnað fyri limaskapi at rokna frá 1. januar 1973.

2. Føroyar fá eina undantaksstøðu sum ikki-limur í EEC í 3 ár inntil 1. januar 1976.

3. Um so er, at Føroyingar sjálvir innan henda dag gera av at fara upp í EEC saman við Danmark, verða treytirnar hesar:

a) Varðveitan av 12-fjórðinga fiskimarkinum inntil 1. januar 1983.

b) EEC hevur eingi juridiskt bindandi lyftir givið um framleingjan av reglunum fyri fiskiskapi innan fyri 12-fjórðinga markið, men við tað at fyritreytirnar fyr hesum undantaksloyvi neyvan broytast, má roknast við, at EEC gongur við til eina framleingjan av einkarrættinum hjá okkara fiskiførum at veiða innan fyri 12-fjórðingar í eitt ávíst áramál framyvir og aftan á 1. januar 1983.

c) Marknaðarskipanin fyri fisk, sum fyrst og fremst ber í sær at tryggja avreiðingarprísirnar og at stýra tí nøgd av rávøu, sum fer til tær ymsu ídnaðargreinirnar, hóskar ikki væl til okkara viðurskifti. Hetta við urkennir EEC, sum tí hevur samtykt at gera tørvandi tillagingar, soleiðis at vit kunnu fáa fyrimunir av hesi skipan, um vit gerast limur.

d) Beinleiðis studningur til fiskaprísin má avtakast, ella ein skipan finnast, so studningurin ikki beinleiðis er bundin til veiðunøgdina.

e) Almennur studul til skipabygging kann varðveitast.

f) Tollur á salti frá ikki-limalandi (Spania) kann verða endurgoldin í øllum førum, uttan tá íð saltið verður nýtt til framleiðslu uppi á landi av fiski, sum verður útfluttur til EEC-lond.

g) Mjólkastudningurin kann varðveitast.

h) Einkarrætturin hjá Tryggingarsambandinum kann varðveitast.

4) Í tíðarskeiðinum 1. januar 1973 — 1. januar 1976 fáa Føroyar tollfrælsi fyri allar vørur, sum seldar verð til Danmarkar. Harafturímóti fáa vit ikki tollfrælsi fyri útflutning okkara til hini EEC-londini. Heldur ikki kunnu flyta vørur tollfrítt til EEC-lond yvir Danmark.«

Lagt skal verða aftrat, at í pkt. 3 í protokolatinum viðvíkjandi Føroyum stendur í føroyskari týðing:

»Um danska stjórnin eftir avgerð heimastýrisins í tí í grein 1 nevnda tíðarskeiði sigur Ráðnum frá, at hon ikki kann geva eina fráboðan um luttøku Føroya í EEC uppá tær í grein 2 nevndu treytir, skal Ráðið eftir áheitan frá dansku stjórnini kanna ta støðu, sum stendst av hesum. Eftir uppskoti frá kommissiónini skal Ráðið taka støðu til skipanir egnaðar at loysa teir spurningar, sum í hesum viðfangi taka seg upp fyri EEC, serstakliga fyri Danmark og Føroyar.«

Í ársfrágreiðingini hjá Føroya Fiskasølu frá apríl 1972 er aftur ein grein, har EEC-málið og samráðingarúrslitið er viðgjørt. Niðurstøðan í hesi grein er henda:

»Sum EEC-málið nú liggur fyri, standa vit yvir fyri at meta um fyrimunirnar við

a) einum tollfrælsum europeiskum marknað, og

b) luttøku í eini marknaðarskipan, sum vil gera tað møguligt at vaksa um og útbyggja vinnu okkara javnt við tiltøkum, sum miða ímóti at stabilisera marknaðarprísirnar mótvegis vansunum við

c) at læsa okkum til eitt 12-fjórðingar fiskimark.

Tað er umráðandi at tryggja frægast gjørligu vakstrarlíkindi fyri okkara vinnu. Hetta vil siga, at okkara møguleikar fyri at fáa tørvandi nøgdir av rávøru til ídnaðin ikki mugu skerjast, og samstundis má okkara útflutningur fáa flest møguligr sømdir í EEC. Soleiðis sum EEC-marknaðarskipanin fyri fisk er uppbygd, er tað ikki líkt til, at nakað annað tilknýti til EEC enn limaskapur kann geva rætt til luttøku í minstaprísskipanini og harvið at sleppa undan teimum reguler ingum av innflutninginum, sum EEC-reglurnar fyriseta, umframt atgongdina til at fáa útflutningstilskot.

Um tann føroyski útflutningurin til EEC fekk fult tollfrælsi, vildi hetta í sjálvum sær verið ein munandi vinningur. Undir eini slíkari skipan, sum sjálvsagt ikki má gjaldast við serligum veiðirættindum til EEC-londini á okkara fiskiøki, hevði vinnan kunnað útviklað seg undir væl betri umstøðum enn nú. Tað eru møguleikar av hesum slagnum, sum 3. grein í protokolatinum sipar til, tá sagt verður, at EEC skal finna eina loysn á teimum ivamálum, sum eitt føroyskt NEI til EEC fórir við sær fyri Føroyar, Danmark og EEC. Av tí at hetta er eitt so umráðandi mál, er tað álvarsliga at vóna, at vit í hesum komandi 3 árunum leggja allan dent á at diskutera og lýsa spurningarnar út frá einum langtíðarsjónarmiði um, hvat ið vissar okkara fiskivinnu bestu vakstrarlíkindi.

Um okkara svar til tær treytir fyri luttøku í EEC, sum vit hava fingið í boði, verður eitt NEI, eru sambært 3. grein í protokolatinum tvinnir møguleikar.

1. Við samráðingum verður funnið fram til eitt nýtt grundarlag fyri okkara limaskapi í EEC. Hetta má sjálvsagt bera í sær, at vit fáa betri sømdir hvat ið fiskimarkinum viðvíkur.

2) Vit fáa eitt fyribils handilssamband við EEC, sum ber í sær tollfrælsi (ella í minsta lagi vissar tollsømdir) fyri vørur okkara á EEC-marknaðinum uttan luttøku í marknaðar-

Framhald á 2. síðu (1)